# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Allir italiumenn eru fegnir um, at misálitið bleiv samtykt, tí landinum tørvar eina virkna stjórn*

*(Silvio Berlusconi)*

# Søgan endurtekur seg í Italia



*Romano Prodi undir orðaskiftinum um misálit á stjórnina*



*Ein av senatorunum svímaði undir tí sera hvassa orðaskiftinum*

**20 mánaðir fekk stjórnin hjá Romano Prodi. Í gjárkvøldið fall hon, og enn eina ferð er Italia í stjórnarkreppu**

Romamo Prodi var longu í gjárkvøldið á skrivstovuni hjá Giorgio Napolitano, forseta og bað um at verða loystur úr embætinum sum forsætisráðharri.

Beint frammanundan hevði stjórnin tapt eina misálitisatkvøðugreiðslu í Senatinum, sum er yvirhúsið í tjóðartinginum. 156 limir styðjaðu stjórnina, men 161 atkvøddu ímóti henni. Orðaskiftið upp undir atkvøðugreiðsluna var ógvuliga hvast. Tingmenn róptu ókvæmisorð eftir hvør øðrum, summir fóru til hendurs, og ein tingmaður svímaði. Tá úrslitið kom, drukku summir sjampanju í tingsalinum.

Giorgio Napolitano, forseti, hevur tvinnar møguleikar. Hann kann skriva út val ella biðja ein annan politikara royna at skipa stjórn. Ber tað ikki til, kann forsetin tilnevna eina fyribilsstjórn.

Politiskir eygleiðarar í Italia eru ósamdir um, hvat fer at henda, men teir eru á einum máli um, at tann politiska kreppan er ikki løtt at loysa, og at hon kann lættliga gerast drúgv.

# Fella frumskóg sum ongantíð fyrr

**Hóast brasilsku myndugleikarnir lovaðu at verja frumskógin við Amazonas, eru ongantíð so nógv trø feld sum nú**

Frumskógurin við Amazonas í Brasil er ongantíð minkaður so skjótt sum nú. Nýggjar fylgisveinamyndir avduka, at fimm teir seinastu mánaðarnar í fjør varð eitt 3.235 ferkilometrar stórt øki ruddað. Tað er ongantíð hent áður, og brasilska umhvørvismálaráðið ber ótta fyri, at hetta er bara helmingurin av sannleikanum.

Hóast myndirnar ikki eru kannaðar til fulnar enn, hevur brasilska stjórnin longu gjørt av at taka neyðug stig. Luis Inacio Lula da Silva, forseti, sum fyri einum ári síðani segði, at myndugleikarnir høvdu fingið tamarhald á skógarvinnuni, hevur hildið kreppufund við stjórnina, skrivar Reuters. Har varð samtykt at senda fleiri løgreglulið at verja frumskógin.

Tann stóra frumskógarfellingin í Brasil er ikki eitt brasilskt innanríkismál, tí frumskógurin hevur stóran týdning fyri allan heimin. Brasilsku myndugleikarnir fara nú at kanna tær nýggju myndirnar, men stjórnin hevur longu sagt seg bera ótta fyri, at myndirnar avdúka ikki alt.



*Stór øki í brasilska frumskóginum eru ruddað teir seinastu mánaðirnar*

*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Bakteria ger um seg

Tey seinastu árini eru altsamt fleiri fólk í ES-londunum vorðin sjúk av bakteriuni listeria, og Danmark er millum tey londini, sum hava verið meinast rakt. Tað sigur evropeiska matvørueftirlitið EFSA. Stovnurin sigur, at í 2006 vóru tilburðirnir við listeriasmittu í Danmark tríggjar ferðir fleiri enn í 2002, og at bara Finnland og Luksenburg høvdu lutfalsliga líka nógvar tilburðir sum Danmark. Listeria rakar vanliga eldri fólk, men smábørn kunnu eisini verða smittað. Av teimum ES-borgarunum, sum vórðu smittaðir í 2006, vóru næstan 80 prosent eldri enn 45 ár.

### Ráðharri frá

Bretski vinnumálaráðharrin, Peter Hain, hevur lagt frá sær, eftir at tað er komið fram, at leiðslan í Labour-flokkinum hevur biðið løgregluna Scotland Yard kanna pengar, sum ráðharrin hevur fingið til valstríð. Nú skal løgreglan gera av, um málið skal takast upp sum alment revsimál, men Peter Hain valdi at taka tær politisku avleiðingarnar alt fyri eitt. Sambært leiðsluni í Labour er talan um 103.000 sterlingpund, sum Peter Hain fekk sum valstuðul, tá hann í fjør royndi at gerast næstformaður í flokkinum.

### Høvdu valt demokrat

Nógv bendir á, at skuldu danir valt tann næsta amerikanska forsetan, so hevði tað verið ein demokratur, sum flutti í Hvítu Húsini. Heimasíðan hjá danska kringvarpinum hevur biðið sínar lesarar atkvøða ímillum teirra, sum stríðast um uppstillingina í USA, og 26.000 brúktu møguleikan. Av teimum atkvøddu 43 prosent fyri Hillary Clinton og 38 prosent fyri Barrack Obama. Tey republikonsku valevnini fingu bara átta prosent tilsamans.